# Fundarfrásøgn

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Sendast til: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Jørgen Meitilberg (JM), Malan Marnersdóttir (MM) og Hans Pauli Joensen (HPJ) |
| Til staðar á fundinum vóru: | SíJ, JM, MM, HPJ, Hugin Skaalum (HS) og Randi Frederiksberg (RF) |
| Skrivað hevur: | RF |
| Fundartíð: | Týsdagur, 14. januar 2014, kl. 9 til 12 |
| Fundarstað: | SSS |

## Umrødd evni:

### 1. Fíggjarætlan (SíJ)

Fíggjarætlanin fyri 2014 varð viðgjørd. Fíggjarleiðarin (HS) luttók í viðgerðini av hesum málinum.

### 2. Ársfrásøgn 2012, útgávulistin

Avgjørt varð, at útgávulistin verður avmarkaður til bert at fevna um vísindaligar útgávur og framløgur/fyrilestrar á ráðstevnum, har eitt skrivligt avrik er latið inn. Eisini varð avgjørt, at bert skrivlig avrik, sum eru útgivin í árinum, koma á listan.

### 3. Disponering av nýggjum hølum (SíJ)

Umrøtt varð, hvussu hølini í Bókbindaragøtu best verða gagnnýtt. Ynskiligt at brúka hølini til undirvísing og felagsøki til tey lesandi. Í verandi líki er ventilatiónin ikki nóg góð til undirvísing av stórum flokkum. Kannast skal, hvat kann gerast við hetta.

Næsta stig er neyvt at eyðmerkja tørv, møguleikar, ventilatiónsviðurskifti og ljóðviðurskifti. Nýggjur fundur er avtalaður ímillum dekanar og fyrisitingarstjóran at viðgera málið.

### 4. Speki

Umrøtt var, hvussu víðari skal farast fram við Speki. Málið verður tikið upp aftur á serstøkum fundi í næstum.

### 5. Ymisk kunning og umrøða

#### a) Lestrarráðini (MM)

Útsett.

#### b) Deildarskrivstovulýsingarnar (MM)

Arbeiðið verður gjørt liðugt í næstum.